# Leygardagin varð stóra jólatræið á Vaglinum í Havn tendrað



Nógv børn og foreldur, ommur og abbar, langommur og langabbar vóru at síggja í miðbýnum, tá ið djarvasti jólamaður í landinum í lesningi spakuliga og líðandi læt seg síga niður at tendra jólatræið.

Hjálparmaðurin í kurvini á stigabilinum hjá Tórshavnar Sløkkiliði strekti 32 langa stigan úr Klubbagarðinum og upp um Tingshúsið, soleiðis at jólamaðurin kundi síga seg niður at tendra 11 m høga nordmansgranntræið.

Sama góðveðrið var ikki sunnudagin. Tó at veðrið var illfýsið við vindi og nógvum regni, varð jólatræið á Argjum, tað á Velbastað, tað í Hoyvík og jólatræið í Kaldbak tendrað. Á Hvítanesi og í Norðradali var so mikið vánaligt veður, at har gjørdist einki.

Men í skýmingini mánakvøldið varð so træið í Norðradali tendrað. Fyri býráðið ynskti Jan Christiansen norðradalsfólki eini gleðilig jól og tendraði træið. Sverri Steinhólm, prestur, hugleiddi um jólini, og hvat, ið tey hava at týða fyri okkum.

Í kvøldarkvirruni í Dalinum, við høgu hábærsligu fjøllunum: Tunguliðfjalli, Stiðjafjalli og Núgvuni í baksýni, spældi Harmoniorkestrið G.H.M. nøkur vælkend jólaløg, fyri teimum, ið møtt vóru við skúlan, har ið træið stendur. Meðan fullmánin skein á stjørnuklára himmalhválvinum yvir Fólkaskarði, endaði hugnaløtan við felagssangi. Tónleikararnir spældu »Gleðilig jól«, og børn og vaksin sungu. So varð farið inn í skúlan, har Mina og Svenning høvdu borðreitt við kaffi, kakao og jólabollum.



















